**TRAPPA TIL SØLU**
Kvartsving trappa, vinstra, frá 1935 við snaraðum snældum. Mát: 225x90 cm. Hædd 267 cm.
*Tlf. 215324*

**POOL-BORÐ**
til søIu fyri 6.000 kr.
*Tlf. 452118 - 287934*

**TÚ, SUM SAMLAR**
uppá lyklaringar, ring til mín, so fært tú eina rúgvu!
*Tlf. 315991 - 215991*

**ERICSSON TELEFON**
Ein seks mánaðar gomul grøn Ericsson T 20 fartelefon við ladara og lumma til sølu fyri 1000 krónur.
*telf. 252115*

**YNSKIST**
Pylsukókari og búffsteikjari ynskjast til keyps.
*Tlf. 260389*

**FERÐASEÐIL**
v/ Norrønu til Danmarkar 8. mars og heim aftur 16. mars í 2-manskamari til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 211443*

**TIL SØLU**
Ein Riccar overlook seymimaskina til sølu fyri 2.000 kr. So gott sum nýggj.
*Tlf. 455443*

**FERÐAST SAMAN?**
Eg søki eftir einum at ferðast saman við vikuskiftið 28.3. til 1.4. við Atlantsflog til Aberdeen.
*Tlf. 319252*

**FERÐAST SAMAN?**
Vágar-Kbh.-Vágar 9.–17. mars ella 16.–24. mars. Ring á
*Tlf. 321306*

**YNSKIST**
Eigur nakar elektriskt hegn at selja mær?
*Tlf. 287764*

**FERÐAST SAMAN**
Eg søki eftir einum at ferðast saman við vikuskiftið 28. febr.–4. mars.
*Tlf. 371601*

**YNSKIST**
Ein lítil, brúkt kopimaskina ynskist til keyps.
*Tlf. 214719*

**LISTAFÓLK**
Gallarí í Danmark sóknast eftir ungum, føroyskum listafólkum. Møguleiki er fyri framsýning og sølu í Danmark. Send foto av tínum verkum og skriva eitt sindur um teg sjálvan. Eyðálvur Carlsson, 335 Leynar, tlf. 250485,
*carlsson@post.olivant.fo*

**FERÐAST SAMAN**
Eg sóknist eftir einum at ferðast saman við til Kastrup 2. mars og heim aftur 11. mars.
*Tlf. 456594 - 216594*

**KAVARAÚTGERÐ**
Komlett kavaraútgerð til sølu. Stødd large-xlarge. Selist bert samlað.
*Tlf. 215614 - 313769*

**OLJUTANGI YNSKIST**
Úti oljutangi ynskist til keyps.
*Tlf. 211077*

**FARTELEFON**
Ein lítið brúkt Sagem fartelefon til sølu.
*Tlf. 251221 ella 313596*

**TIL SØLU**
Eitt Yashica fototól við blitsi og tveimum linsum, onnur 50 mm, hin 80 til 200 mm, til sølu fyri einans 1.500 kr.
*Tlf. 444069*

**MOTOROLA V66**
Ein tann nýggjasta fartelefonin frá Motorola - eisini tann minsta. Telefonin vigar bert 79 gr., hevur vibrator, nógvar ringitónar, spøl, kalendara, WAP, voicedial, voicenotes, displayið kann skifta lit og mangar aðrar hentleikar. Telefonin er bert 4 vikur gomul. Verður seld við 2 løðarum (ein vanligan + ein til bilin) og headsetti. Prísur einans 3.500 kr. Nýprísur fyri alt ca. 5.000 kr. E-mail: kd@post.olivant.fo
*Ring 0045 51900522 aftaná kl. 11*

# HEILSANIR



**Góða Elisabet**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum ynskja
**omma og abbi í Hvannkróki**



Nú ert tú eldri enn eg.
**Heilsan xxxxx**



**Góði mammubeiggi**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 24. febr. Alt tað besta ynskir
**Rói**



**Góði, elskaði Rani**
Tillukku við 12 ára degnum. Ogur elska teg. Jesus pápi fylgi tær. Keðiligt pabba mátti avstað áðrenn tín føðingardag.
**Kærastu heilsanir, mamma, pabba og Monika**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum tann 26. februar. Alt tað besta í framtíðini
**heilsan Sámal**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við degnum. Her sita abbi og Martin so fittir báðir. Eisini ein heilsan til tín, góða omma.
**Henning, Martin og Sólveig**



Ein heilsan til hesi fittu systkinabørnini, Benedikte 7 ár og Elisabet 4 ár.
**Heilsan Maria, eisini frá ommu og abba í Gundadali**



**Góði, elskaði Regin!**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 27. febr. ynskja
**mamma, babba og Irena**


**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# TILTØK

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur. Páll Poulsen talar um 1. Kor. kap. 10.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið, har allar kvinnur eru vælkomnar.

**Rhema á Hálsi**
Mána- og mikukvøldið kl. 20.30 Bønartímin.
Vikuskiftismøti: Evangel. møti verður fríggja- og leygarkvøldið kl. 19 og sunnudagin kl. 17. Tormund Hansen o.fl. luttaka við sangi, vitnisburði og talu. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hósdagin kl. 16 venur Gentukórið. Kl. 20 Ungdómsmøti, sang- og vitnikvøld.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Blákrossmøti v/ Helga og Jóannes.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikukvøldið kl. 20 Uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Alheims bønardagur fyri kvinnur í Havn verður í ár hildin í Filadelfia, Landavegur 22, fríggjakvøldið 1. mars kl. 19.30, har allar kvinnur kunnu vera við.
Sunnnudagin kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 21 í KFUK: Vegna umvæling í KFUM verður turrur fiskur og spik í KFUK, eftir føstugudstænastuna.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19 Delli, kl. 21 Bøn fyri býnum.
Í annaðkvøld kl. 19 Teen Xtreme.
Fríggjakvøldið kl. 20 Alheims kvinnubønardagur.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Føstugudstænastur**
**Mikukvøldið:**
*Vestmanna:* kl. 20 Jónsvein Bech
*Kollafjørður:* kl. 20 Meinhard Bjartalíð
*Haldarsvík:* kl. 19.30,
*Tjørnuvík:* kl. 20.30 Emil Olsen
*Vágur:* kl. 19,
*Sumba:* kl. 20 Hans Ejler Hammer
*Fuglafjørður:* kl. 20 Jógvan Fríðriksson
*Gøta:* kl. 20 Kjartan Mørkøre
*Gjógv:* kl. 19,
*Funningur:* kl. 20.30 Marjun Bæk
*Norðskála:* kl. 19,
*Eiði:* kl. 20.30 Uni Næs
*Havnar kirkja:* kl. 20 Heri Joensen
**Hóskvøldið:**
*Argja kirkja:* kl. 20 Inga Poulsen Dam
*Nes kirkja:* kl. 20.15 Uni Næs
*Leirvík:* kl. 20 Jónsvein Bech
*Klaksvík:* kl. 20 Emil Olsen

**Saron, Vestmanna**
Hósdagin kl. 19 Frítíðararbeiði.
Telefonandaktin 424 741.

**Filadelfia, Sundalagið**
Í morgin kl. 18-20 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Jóannes I. Joensen talar. Evni: Bøn og forbønarinnar tænasta. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Vikuskiftisfundir við Lenu og David Hansen. Byrjað verður leygarmorgunin kl. 10 og kl. 13.45 við seminar. Um máltíðir ynskjast er møguleiki at tekna seg á tlf. 449962 í seinasta lagi mikudagin.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við David Hansen.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti við Lene Hansen og Møti kl. 17 við David Hansen.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10 Bøn, kl. 20 Alpha-skeið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúl, kl. 18 Møti v/ Hjalgrím Davidsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bíbliutími og Bøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.

**Café One Way, Tvøroyri**
Týsdagin verður barnahugni kl. 15.30, øll børn eru vælkomin.
Onskvøldið kl. 21 Bønarmøti fyri kvinnur.
Tórskvøldið kl. 19.15 venur Dansibólkurin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.
Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/261516*.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 25. febr.:*
kl. 9.45–10.15: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 10.15–18.00: Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagsskapin.
kl. 14.00–18.00: Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491.
*Týsdagin 26. febr.:*
kl. 10.00–12.00: Vit baka.
kl. 10.00–11.30: Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Hoyritól, Ina Wessberg, autiologur
*Mikudagin 27. febr.:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur.
kl. 15.00: Túrur.
*Hósdagin 28. febr.:*
kl. 10.30–11.00: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen.
kl. 15.00–17.00: Tøtingarhugni í kjallaranum, Ása Hátún og Súsanna í Jákupsstovu.
*Fríggjadagin 1. mars:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00: Døgurði.
kl. 13.00–17.00: Klassiskur føgutónleikur í stovuni.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
**Tín** stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Sporafundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarаíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
*(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)*
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Alzheimerfelagið**
*Tórsbyrgi 16*
*100 Tórshavn*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
*Íslandsvegur 10*
*tlf./fax 321520*
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingafelagið í Århus**
*Vestergade 48D*
*8000 Århus C*
*Tel. 86 18 06 04*
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.